DAGSINS MEINING

Marita farin

Nógvir føroyingar hugsa djúpt í dag og sváru kreppuárini í fyrru helvt av nítiárunum spríkja fram aftur í minninum, fesk, lærurík og óunnilig,sum minni um eina farna tíð, íð tilkomni føroyingurin ongantíð gloymir.

Ósmæðin, beisk, ópolerað og døpur sum altíð komu deyðsboðini av Maritu Petersen sunnudagin. Einans 60 ára gomul. Okkara fyrsta og higartil einasta kvinna, sum hevur sitið í løgmannssessinum.

Fjølmiðlarnir kendu Maritu og fylgdu henni frá fyrsta degi, hon settist í tá óunniliga løgmannsstólin, sum skiparin á einum samfelag, ið lá í knúsi eftir at hava bóltað rút fíggjarliga fleiri ferðir innan vikur. Leikluturin hjá Maritu minti ikki sørt um leiklutin hjá Churchill undir seinna heimsbardaga. Hóast bumburnar ikki regnaðu yvir Føroyar í orðsins rætta týdningi, so hevi fólkið mist vónina á sama hátt, sum tá kríggj herjar. Vánalig ella ongi útlit og fólk í hópatali flyddu av landinum, settu seg niður í fremmand lond sum búskaparligir flóttar, miseydnaði og særd.

Marita kom sum eitt skot inn á politiska pallin í Føroyum. Fyrst á ting og síðan í landsstýrið, og tá tað virkuliga leikaði á, tók hon róðurtørn á søkkandi føroysku samfelagsskútuni. Skútan rak fyri vág og vind, og tað fyrsta, hon gjørdi, var at leggja hana upp í vindin. Síðan fór hon til pumpurnar, og tá skútan var nøkulunda lens, varð farið at pjøssa upp á teir ringastu lekarnar. Skútan var ikki komin upp á rættkjøl, tá Marita fór úr løgmannssessinum í 1994, men tær fyrstu avgerandi umvælingarnar vóru gjørdar og slóðað var fyri stóru veruligu yvirhálingini.

Við Maritu á odda í Tinganesi kom eitt nýtt rák í Tinganes, sum fjølmiðlar fegnaðust um. Hon lat Tinganes upp, og opinleikin gav møguleika fyri betri tíðindaflutningi. Hon tók upp eftir ráki úttan úr heimi, har pressan hevur ein sjálvsagdan leiklut á teimum bonaðu gólvunum. Hon dugdi væl at föra seg fram í pressuni, og hon goymdi seg ikki.

Marita stóð seg væl í andróðri, og politiskt man hon ivaleyst hava sitið sum løgmaður í svárasta tíðarskeiði føroyinga yvirhøvur. Hon var stór, statelig, og hevði myndugleika, og kanska føroyingurin longdist eftir eini kvinnu í oddasessinum. Í Vestmanna høvdu kvinnurnar fingið skil upp á kommununa, kanska fór hon at at gera tað liviligt aftur í Føroyum.

Øll odds vóru ímóti Maritu, tá hon settist í løgmannssessin. Vit vóru endaði í einari búskaparkreppu, sum ongin hómaði eina slóð úr. Búskaparkreppan hevði rakt okkara grannalond frammanundan. Nú var hon her. Men tað sum fyrst og fremst svævdi føroyska samfelagið var, at akkurát um hetta mundi sovnaði náttúran eina løtu. Fiskastovnarnir vóru so illa fyri sum ongantíð fyrr, havið var deytt, onki æti at sígga, lomvigin hevði pakkað sekkin í Høvdanum í Skúvoy, virkini lógu við turrum gólvum og meginparturin av flotanum var farin á húsagang.

Marita er farin og politiskt fara vit at minnast hana sum jarnkvinnuna, ið hevði dirvi at stjórna einum lamskotnum Føroyum, tá einki mannfólk var eftir í landinum.

Friður verið við minninum

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Álitið um Føroya Trygdardepil ikki nóg væl umhugsað

Jógvan við Keldu
løgtingsmaður

Longur tú kemur inn í álitið um Føroya Trygdardepil, sæst greitt, at best og bíligast er at leggja hann í Klaksvík. - Høvundurin og fjølmiðlamaðurin Grækaris Magnussen var ikki nóg gjølligur í viðgerðini í Sjónvarpi Føroya næstseinasta fríggjakvøld.

Út frá teirri sanroynd at eg sum býráðsformaður í Klaksvík og løgtingslimur fyri Norðoyggjar var tætt knýttur at málinum um Trygdarmiðstøðina, tá hon endaliga fyri trimum árum síðani varð løgd í Klaksvík, og minnist á tunga burðin, fari eg at gera nakrar viðmerkingar, nú málið eisini hevur verið viðgjørt av Sjónvarpi Føroya.

Tórbjørn Jacobsen, fyrrv. landsstýrismaður í mentamálum greiddi mær frá fyrr í ár, at hann hevði sett nevnd til at koma við áliti um ein Trygdardepil.

Nevndin hevur fingið til vega álit, sum s/pf Westtec úr Sørvági hevur loyst úr lagdi.

Álitið er grundað á: Fund við kanningarnevndina 20. mars í ár. - Vitjan á Trygdarmiðstøðini í Klaksvík 11. apríl í ár. — Vitjan á Brandskúlanum við Áir 18. apríl í ár. — Umframt útflýggjað tilfar frá nevndini o.a.

Kanningarnevndin ið sipað verður til, eru fólkini, ið landsstýrismaðurin í mentamálum setti. Sum eg havi skilt, fevnir nevndin um Óla Hans Olsen fyri Mentamálastýrið, Súsanna Sørensen fyri Oljumálastýrið, Eyðun Berth Jacobsen fyri Fiskimálastýrið og Petur Lava Olsen, umboðandi vinnu-málastýrið.

Grundleggjandi misskiljingar

Álitið er ikki serliga drúgvt. Kanningin snýr seg bert um tvinnanda øki, nevniliga við Áir, og grótbrotið á Strond. — Gingið verður í høvuðsheitum út frá eini samanlegging av Trygdarmiðstøðini í Klaksvík og Føroya Brandskúla við Áir.

Fyrst skal viðmerkjast ein grundleggjandi misskiljing. Talan er ikki um trý pláss í Klaksvík, men bert um tvey, nevniliga á Borðoyavík ella á Strond. (Tó kann verða talan um eina stutta skiftistíð, meðan flutt verður norður á Strond). — Her er ov lættliga farið um hjá ráðgevarunum.

Ráðgevararnir hava gjørt eina samanbering av kostnaðinum. Teir koma til, at verður útbyggingin framd við Áir verður kostnaðurin 32 mill. kr. meðan kostnaðurin á Strond verður 48 mill. kr.

Spara 22.4 mill. kr. og kann gerast betri

Verður nú nærri hugt at hesi uppseting, fari eg fyribils at gera hesar viðmerkingar, sum eru av stórum týdningi:

- Skal stovnurin leggjast í Klaksvík, er óneyðugt við hotellfasilitetum 7 mill. krónur
- Venjingarhylur við aldugeneratori. Avtala kann fáast við svimji- høllina, sum liggur skamt frá undirvísingarhølunum 6.3 mill. krónur
- Undirvísingarhøli, starvsfólkarúm eru til taks. Høli verða leigað, sum liggja stutt frá matstaði á Tekniska Skúla 9.1 mill. krónur.

Her kunnu í fyrsta lagi sparast 22.4 mill. krónur av teimum 48.3 mill., og møguleikarnir standa avgjørt fremri í mangar mátar. — Nú fáa vit eitt tal sum er slakar 26 mill. krónur.

Ein vavgreytur

Víst verður eisini til í álitinum, at neyðugt er við frálæruhølum v.m., 370 fermetrar, og tað verður viðgjørt, sum um tað ikki er í Klaksvík.

Trygdarmiðstøðin í Klaksvík hevur ikki færri enn 412 fermetrar at ráða yvir ídag. — Hetta áttu ráðgevararnir at vita.

Á síðu 6 verður mett, at plaseringin við Áir ger, at lætt kann ferðast millum heimstað og skeið- depilin.

Ovari á somu síðuni verður sagt, at »við Áir eru góð bústaðarviðurskifti«, tí liggur so væl fyri har.

Tá fólkið lættliga kann ferðast ímillum, hvør skal so brúka hesi góðu bústaðarviðurskiftini. Annars eru sera góð bústaðarviðurskifti longu í Klaksvík. — Her er langt lop frá teori til praksis.

So er talan um roykin niðan á vegin frá komandi undirsjóartunnilinum. Hetta meta ráðgevararnir sum størsta týdning, »at vera sera óheppi at leggja virksemið við eldi og royki tætt upp at einari komandi høvuðsferðslueðr«.

Samstundis, sum teir tosa um trý stað í Klaksvík, sum veruliga bert eru tvey, gongur kostnaðurin uppá staðið á Strond, roykurin siga teir verður uppi á Borðoyarvík.

Hetta álitið er ein vavgreytur, og eigur at endurskoðast í størri álvara.

Samstundis, sum roykurin frá Borðoyarvík verður gjørdur til eina hóttan, verður roykurin frá økinum við Áir, sum helst er størsta ferðsluøkið í Føroyum til »avmarkingar í samband við økt virksemi«.

Álitið hevur nógvar aðrar veikleikar, sum eg ikki fái tíð at viðgera her í fyrstu syftu.

Ein ógjølligur Grækaris

Tað sum ikki er minni álvarsligt í hesum málið, er viðferðin málið fekk fríggjakvøldið herfyri frá Grækarisi Magnussen í Sjónvarpi Føroya, hesin, ið bæði er útbúgvin fjølmiðlamaður og ein sera gjølligur høvundur.

Var nakað skil á í Sjónvarpi Føroya, átti hesin — annars so dugnaligi — fjølmiðlamaður at fingið eina átalu, tí vit eiga eisini at minnast til, at hann er úr sama øki, sum Áirnar liggja. — Klaksvíkin hevur onki umboðsfólk í Sjónvarpi Føroya.

Hetta eru bert fyribils veikleikar eg her vísi á. Longur tú kemur inn í álitið, sæst greitt, at alt bendir á, at tað er bæði betri og bíligari at leggja depilin í Klaksvík. Hetta fari eg at biðja Oljumálastýrið, Fiskimálastýrið, Mentamálastýrið og Vinnumálastýrið leggja sær í geyma í eini víðari viðgerð.

Annars harmar tað meg, at Klaksvíkar Býráð ikki beinanveg gjørdi vart við seg. Trygdarmið-depilin var júst eitt mál, ið Klaksvíkar Kommuna í sínari tíð legði stóran dent á í hesum sjóvinnufrálæruøki.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-friggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

VIÐMERKINGAR

Stop Israels krig

Leif Jacobsen

Israels invasion i Libanon i 1982 og de israelske styrkers åbenlyse brutalitet rejste for første gang en bredere kritisk holdning overfor Israel i det ellers stærkt Israel-venlige Danmark.

Under den første Intifada (fra '87), beordrede Rabin israelske soldater til at brække arme og ben på unge stenkastende palæstinensere. Igen vækkede den israelske brutalitet international fordømmelse, som også spredte sig til Danmark. Det samme sker nu, hvor Israel henretter ledende palæstinensere og reelt fører krig ved at bombe beboelsesejendomme og selvstyremyndighedernes bygninger, og hvor de sender torturbødlen Gillon til Danmark som ambassadør.

Zionisme

Israels brutalitet, mord, tortur og grov undertrykkelse har palæstinenserne levet under i mere end 50 år. Det er ikke undtagelsen i tilspidsede konflikter, men uløseligt bundet sammen med zionismen, den jødiske fundamentalisme, der er det politiske, ideologiske grundlag for Israel, og som diskriminerer alle ikke-jøder.

Det hænger også uløseligt sammen med, at Israel i mere end 50 år har været en besættelsesmagt. Bakket op af først England og siden USA har zionisterne brugt alle midler for at besætte Palæstina og derefter for at bevare kontrollen med området. Diskrimination, fængslinger, tortur, økonomisk udsultning, vilkårlige udgangsforbud, beslaglæggelse af jord, nedrivning af huse, censur, forbud mod palæstinensiske organisationer og mord på ledende skikkelser har været israelsk politik overfor palæstinenserne såvel i de besatte områder – Vestbredden, Gaza og Golan - som inde i selve '48 området, Israel.

Besættelse er undertrykkelse, og Israel er ingen undtagelse. Israel har arbejdet tæt sammen med det tidligere apartheidregime i Sydafrika og med diktaturstater som Chile under Pinochet.

USAs vagthund

Israel får lov til at gøre hvad som helst, fordi det er USA's og EU's allierede i det strategisk vigtige Mellemøsten, hvor de lettilgængelige olie ressourcer skaffer enorme profitter til vestlige olieselskaber. Det er vigtigt at markere helt klart, at Israels politik er fuldstændig uacceptabel. Palæstinensernes rettigheder skal anerkendes, der skal oprettes en sekulær stat i Palæstina med lige rettigheder til alle. Torturbødler fra Israel - eller noget andet land – skal ikke kunne leve i diplomatisk skjul. Hverken her eller noget andet sted. Torturbødlen Gillon bør stilles til regnskab for sine handlinger.

Føroyar tørva eina langtíðar ferðslutrygdarætlan

Jón Kragesteen
Dagligur leiðari á Ferðslutrygd

Undirritaði er av Sosialinum biðin um at skriva nøkur orð í sambandi við, at blaðið ger serligt burtur úr evninum bilar og ferðsla. Vandamálini í ferðsluni eru nógv, so evnini at skriva um tróta ikki. Skrivað kundið verið um ungdómin, sum aftur og aftur kemur sær í meiningsleysar vanlukkur, um hvussu vit kundu gjørt ferðsluupplæringina betri, um hví bilbeltið ikki altíð verður nýtt, um endurskin, um hví so stórur partur av okkara ferðsluumhvørvi framvegis sær út til einans at vera fyri tey, sum sita aftan fyri róðrið og ikki tey, sum eru til gongu, á súkklu ella í rullistóli.

Á Ráðnum fyri Ferðslutrygd verður dagliga arbeitt við hesum spurningum á ymiskan hátt. Vit kundu lagt onnur evni afturat, t.d. hvussu vit kundu ment trygdarskipanir í bilunum, men lat tað fara hesuferð.

Tað sum fyrst og fremst upptekur okkum á Ferðslutrygd er, hvussu vit kunnu fáa setta í verk eina langtíðar ferðslutrygdarætlan fyri landið, har vit eftir einum skipaðum leisti kunnu fáa ferðsluna tryggari, soleiðis at vit øll í landinum at draga somu línu.

Í veruleikanum hevur Ferðslutrygd í fleiri ár í talu og skrift og á annan hátt roynt at fáa landsins evstu myndugleikar at seta út í kortið ein langtíðar ferðslutrygdarpolitikk. Fyri tveimum árum síðani sá út til at okkurt fór at henda. Komið varð so langt, at í løgmansrøðuni á ólavssøku 1999 varð nevnt, at landsstýrið fór at arbeiða við einari ferðslutrygdarætlan grundaða á Nullhugsjónina.

Men síðani tá er einki hent. Ráðið fyri Ferðslutrygd og onnur her á landi, sum fáast við ferðslu og ferðslutrygd, tað veri seg løgregla, Bileftirlit, Landsverkfrøðingsstovnur, bý- og bygdarráð, koyrilærarar, skúlamyndugleikar, bilaseljarar og onnur, arbeiða framvegis hvør í sínum lagi á besta hátt. Tað er ikki tí, øll vilja vit gera ferðsluna tryggari, men einki mál er sett út í kortið, eingin avgerð tikin um, hvar høvuðsdentur skal leggjast osfr.

Táið so vanlukkur henda, kyknar eitt ógvusligt orðaskifti upp og hvør roynir í sínum lagi at siga, hvør orsøkin er, og hvatið skal verða gjørt. Men tvær vikur aftaná ella so, sýnist alt at vera gloymt, í hvussu er hjá teimum, sum ikki persónliga vórðu rakt.

Í ár eru liðin 25 ár, síðan Ferðslutrygd varð sett á stovn. Besta føðingardagsgávan sum hugsast kann í hesum sambandi, er at landsins evstu myndugleikar settu sjøtul á at gera eina langtíðar ferðslutrygdarætlan fyri Føroyar — grundað á hugsaninar í Nullhugsjónini.

(Skjóti upp, at hjálagda grafikkfílan við symbolinum fyir Nullhugsjónini verður sett inn her!)

Aðalmálið í Nullhugsjónini

- eingin dripin og eingin álvarsliga skaddur í ferðsluni

Menniskjaligt at gera mistøk

Í Nullhugsjónini verður ásannað, at vit sleppa ongantíð heilt undan, at menniskju gera mistøk — hetta hóast ferðsluútbúgvingin alsamt verður betrað. Tí má samfelagið gera viðurskiftini í ferðsluni so trygg, at menniskjalig mistøk ikki verða revsað við deyða ella lívlongum avlamni.

Ferðslan er eitt arbeiðspláss

Á arbeiðsmarknaðinum hevur arbeiðsgevarin skyldu at skipa fyri, at t.d. allar maskinur eru so tryggar, at skaði ikki hendir av óansi, sum daglig rutina av ymiskum orsøkum kann føra til. Hyggja vit at flogferðsluni, kunnu vit vísa á eitt ítøkiligt dømi, sum hendi fyri kortum, nevniliga at Føroyaflogfar var um at renna saman við eitt annað flogfar. Talan var um mennniskjaligt mistak, men tekniska útgerðin í flogførunum syrgdi fyri, at vanlukkan ikki hendi.

Í ferðsluni er samfelagið »arbeiðsgevarin«!

Við øðrum orðum liggur tað á myndugleikunum at gera alt fyri, at tær vanlukkur, sum vit vita fara at henda — tí at mennuskju altíð fara at gera mistøk — vera so lítið álvarsligar, sum til ber

Nullhugsjónin utopi?

At hava eina Nullhugsjón er eitt sera høgt mál at seta sær, og mangan verður spurningurin settur, um tað ber til at røkka hesum høga máli. Men tað er ein sannroynd, at skulu vit koma framá, mugu vit seta okkum høg mál. Hetta hava fleiri lond í Europa ásannað - við Svøríki og hinum norðurlondum á odda. Hesi lond hava ásannað, at Nullhugsjónin er einasta mannvirðiliga framtíðarmálið, sum stevnt kann verða ímóti, tá um ferðslutrygdararbeiði ræður.

Ábyrgdin skal býtast

Meginparturin av ferðsluvanlukkum henda av mennniskjaligum áðum. Tað vanliga hevur verið, at so at soga øll ábyrgdin verður lødd á hin einstaka, t.d. bilføraran. Men í Nullhugsjónini verður ført fram, at hetta er ikki rætt. Ábyrgdin skal býtast millum fólki í ferðsluni, samfelagið, sum ger vegir, lógir og reglur — og bilarframleiðararnar. Tí hevur samfelagið skyldu at gera vegirnar soleiðis, at menniskjalig mistøk verða »fangað«, áðrenn vanlukkan hendir og bilaframleiðarin hevur skyldu at gera bilin so tryggan at menniskjalig mistøk verða »fangað« áðrenn ov seint er.

At røkka Nullhugsjónini mugu vit tí arbeiða fyri at fáa

- bestu ferðsluupplær ing/útbúgving
- bestu akfør
- besta ferðsluumhvørvi
- bestu lógir og reglur
- besta eftirlit
- og framhaldandi menning av hesum nevnda

Tað ræður um at hugsa »globalt« og »handla lokalt«

Vit kunnu ikki vænta at røkka evsta málinum í Nullhugsjónini í morgin, men vit kunnu seta okkum ávegis mál at røkka næsta ár ella næstu fimm árini. Táið ávegis málini eru sett, skulu vit gera av, hvussu vit koma fram til tey og hvør skal gera hvat. Og sjálvandi skal kostnaðarmetan verða gjørd.

Tað loysir seg at nýta pening til trygd

- hetta vísa allar útrokningar — her er beinleiðis peningur at spara hjá samfelagnum!

Stór útsøla av meturvørum

Týsdagin 28.08.01 byrjar okkara útsøla av meturvørum við stórum avsláttri

-50%

og nógvar sera bíligar restir

Kom inn og ger kvettið

SP/F MARJUN HEIMÁ
C. Ployensgøta 4 • 100 Tórshavn
Tel. 31 25 31 • Fax 31 23 19